**Sjálvstýrisflokkurin**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 6/2009: Uppskot til samtyktar um Oyggjaleikir í Føroyum í 2017**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur undir við ætlanum løgmans at fáa oyggjaleikirnar til Føroya í 2017 og at stovna serstakan oyggjaleikagrunn at fíggja oyggjaleikirnar í 2017.

Løgtingið fegnast við løgmanninum um framúrskarandi ítróttaúrslit Føroya á oyggjaleikunum á Álandi og átekur sær at aksla ta ábyrgd, ið fylgir við ítróttaliga og mentanarliga týdningi oyggjaleikanna. Føroyar mugu átaka sær at skapa hóskandi karmar fyri ítróttina, eisini at skipa fyri leikum sum hesum.

**Viðmerkingar**

Sjálvstýrisflokkurin vil við uppskotinum vísa løgmanninum fullan stuðul, nú hann alment hevur boðað frá, at Føroyar skulu bjóða seg fram sum vertir fyri oyggjaleikunum í 2017.

Við at samtykkja uppskotið heimilar og stuðlar Løgtingið ætlanum landsstýrisins at taka stig til og fremja neyðug politisk átøk til tess, at landsins partur í fyrireiking og fígging av oyggjaleikunum ikki liggur eftir.

Serliga er samtyktin ætlað at stuðla almennu ætlanunum at stovna serligan óheftan grunn, ið við stuðulsjáttan kann átaka sær at veita fíggjarliga trygd fyri fyrireikingunum og tryggja álit á føroyska átakið mótvegis stuðlum, verktakarum og ítróttastovnum, veri seg Ítróttasambandi Føroya, oyggjaleikafelagnum ella einstøkum ítróttasambondum.

Litil ivi man vera um, at hesar útreiðslur koma fleiri ferðir aftur í inntøkum av ferðavinnu og í góðari umrøðu víða hvar.

Men ikki minst er samtyktin ætlað sum viðurkenning Løgtingsins av teimum megnar ítróttaavrikum, ið øll tjóðin fegnaðist um á sumri 2009. Føroyar vunnu fleiri heiðursmerki enn nakrantíð fyrr, Føroyar gjørdust besta oyggjalandið á leikunum, men mest av øllum vístu føroysku ítróttafólkini samanhald, ítróttaanda og virðiligan atburð, ið boðar frá góðum í øllum verki her á landi og hjá landsmonnum okkara uttanlands.

Besta heiðursmerki, vit kunnu veita besta oyggjaleikaliðið okkara nakrantíð, man vera at vísa okkum sum bestu oyggjaleikavertir nakrantíð.

**Á Løgtingi, tann 29. juli 2009**

Kári P. Højgaard Kári á Rógvi